

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 09 - 2012

# Væleydnað trygdarvenjing í oljuhavnini

Oljuvinna og trygd eru tætt atknýtt. Hetta er ein sannroynd í altjóða oljuvinnuni. Og nú leitað verður eftir kolvetnum á føroyska landgrunninum er hetta eisini nakað, sum føroyingar mugu sanna. Í sambandi við boringina hjá Statoil hava verið fleiri venjingar. Oljuútgerðarhavnin í Runavík er eisini noydd at fylgja hesi gongdini og liva upp til tey somu krøv, sum oljuvinnan í øðrum londum setir. Leygardagin skipaðu Atlantic Supply Base og Skálafjarðar Sløkkilið fyri eini trygdarvenjing. Eli Lassen, stjóri á oljuhavnini, sigur, at venjingin gekk væl. Hann vísir á, at tað er sera týdningarmikið, at føroyingar geva slíkum venjingum ans, nú ein møgulig oljuvinna stendur fyri framman. Venjingin leygardagin snúði seg um, at ein byngja við vandamiklum farmi var koppað yvir ein mann, sum kom at liggja undir við báðum beinum. Oljuhavnin í Runavík hevur ein týðandi leiklut í royndunum at finna olju og gass í føroysku undirgrundini. Hon er eitt av knútapunktunum í arbeiðinum. Sambært føroyskari lóggávu skal alt tilfar, ið verður brúkt umborð á boripallinum, fyrst flytast til oljuhavnina, haðani tað so verður flutt út á pall og øvugt. Umleið 15 fólk eru knýtt at oljuhavnini, tá borað verður. Ì ár verður arbeitt í umleið 4 mánaðir.